# Alfa Laval sendir 1000 fólkum til hús

Stóra, svenska fyritøkan Alfa Laval kunngjørdi fyrradagin, at hon fer at siga 1.000 starvsfólkum úr starvi komandi vikurnar. Alfa Laval hevur umleið 12.000 fólk í arbeiði í 26 londum, og 300 av teimum, sum fáa uppsagnarbræv í næstum, arbeiða hjá deildini í Svøríki. Við uppsagnunum sparir fyritøkan einar 400 milliónir svenskar krónur árliga. Leiðslan í Alfa Laval sigur, at virksemið er minkað nógv orsakað av fíggjarkreppuni, serliga í Eysturevropa og Asia.




# Herurin skal tryggja Meksiko bý

Harðskapurin og lógloysið í Meksiko versna støðugt, og støðan hevur ongantíð verið so ring sum nú, hóast myndugleikarnir hava sett bæði løgregluna og herin inn í bardagan ímóti lógloysinum. Í gjár bleiv kunngjørt, at næstan 5.400 meksikanskir løgreglumenn lótu lív í tænastu í fjør, og at tað var meiri enn tvær ferðir so nógv sum í 2007. Felipe Calderon, forseti, sigur, at í framtíðini skulu hermenn standa á varðhaldi í øllum teimum stóru býunum og fram við høvuðsvegunum.



*Størsta skipið í føroyska flotanum fyllir ikki nógv í dokkini hjá Bluhm & Voss*



*Teir nýggju stabilisatorarnir sita heldur niðari á skipssíðuni enn teir gomlu*

ar, og tað kostar millum 15 og 20 milliónir krónur at seta teir nýggju stabilisatorarnar í skipið.

## Esbjerg fyri Hanstholm

Nú Norrøna er í dokkini í Hamburg, hevur reiðaríið nýtt høvi til at hava fimm ára sýn við skrúvunum. Harafturat eru botnurin málaður, og bildekkið er eisini málað.

Hinvegin er einki plátuarbeiði at gera, tí botnurin hevði ongan skaða fingið av nøkrum slagi.

Norøna fer aftur í sigling úr Hanstholm tann 24. januar, og vikuna eftir byrjar siglingin til og úr Esbjerg, og hagar fer skipið at sigla, til summarsiglingin byrjar.

